## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin - Ólavsøkuaftan:**
Lot til andøvsgul av landsynningi og fyrrapartin regn. Seinnapartin lot av suðri og yvirhøvur turt og mjørkaflókar, men um kvøldið aftur regn. Hitin millum 16 og 19 stig.




**Veðrið Ólavsøkudag:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi, um kvøldið veksur hann vindin upp í ein strúk. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 17 og 20 stig, um náttina niður í eini 10 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og suðri og regn ella mjørki av og á. Hitin millum 15 og 18 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av landsynningi og eystri og regn av og á. Hitin millum 11 og 15 stig.

# Ein ordans pussfiskur

Í gjáramorgunin fangaði Jonhard Thomsen ein ordans pussfisk í Hvalba, meðan hann var til arbeiðis:

- Eg hoyrdi eg eitt ordans pums niðri á sjónum. Eg helt, tað var ein fuglur, sum stuttleikaði sær, men tá eg hyggi aftur, síggi eg eitt rokilsi og okkurt reytt og stórt einar 300 metrar frá mær, greiðir Jonhard Thomsen frá.

- Eg fór nærri og at enda fangaði eg pussfiskin. Tá hann doyði, varð hann sera reyður um búkin. Áðrenn var hann gráur. Tað verður sera spennandi at vita, hvat tað er fyri ein fiskur. Kanska ein sovorðin, sum japanarir eta, sigur Jonhard Thomsen at enda.

Á Fiskirannsóknarstovuni meta tey, at pussfiskurin er ein laksastyrja, sum av og á fæst í føroyskum sjógvi.

*- horsdal*



*Pussfiskurin er 1,20 metur langur, 80 sentimetrar breiður og vigar 50-60 pund. Her stendur finnarin, Jonhard Thomsen, við fiskinum í hondunum.*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | 11 |
| Qaqortoq | 11 |
| Ammassalik | 12 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 14 |
| Lerwick | 15 |
| Aberdeen | 22 |
| London | 30 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 23 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 25 |
| Keypmannah. | 26 |
| Helsinki | 17 |
| Moskva | 16 |
| Berlin | 30 |
| Warzawa | 30 |
| Kiev | 27 |
| Bukarest | 29 |
| Paris | 34 |
| Madrid | 35 |
| Róm | 30 |
| Malorca | 30 |
| Athen | 32 |
| Malta | 31 |
| Tunis | 33 |
| Beijing | 26 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 16 |
| New York | 30 |
| Miami | 32 |
| Los Angeles | 26 |
| Meksikobýur | 23 |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 17 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1014 hPa. við Føroyar grynnist. Eitt djúpt lágtrýst, 974 hPa. í útsynning úr Íslandi stendur í stað og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum Ólavsøkuaftan.




**Í dag:**
Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi fer spakuliga í landsynning og brúgvalagið til Føroya verður væntandi við Føroyar í dag, men fer síðani vestureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 26/7 kl. 06⁰⁰– 27/7. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,3°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 26/7 kl. 06⁰⁰– 27/7 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 97,3 mm





Sosialurin

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI


## VESTFALLSKYRRINDI

29. juli — Mánin longst frá jørðini
2. august — Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 27. Juli | 09.17 | 21.39 | 08.17 | 20.39 | 08.32 | 20.54 | 11.17 | 23.39 | - | 12.17 | 07.32 | 19.54 | 06.32 | 18.54 | 09.32 | 21.54 | 10.32 | 22.54 | 09.02 | 21.24 | 10.17 | 22.39 |
| 28. Juli | 09.58 | 22.18 | 08.58 | 21.18 | 09.13 | 21.33 | 11.58 | - | 00.39 | 12.58 | 08.13 | 20.33 | 07.13 | 19.33 | 10.13 | 22.33 | 11.13 | 23.33 | 09.43 | 22.03 | 10.58 | 23.18 |
| 29. Juli | 10.36 | 22.55 | 09.36 | 21.55 | 09.51 | 22.10 | 00.18 | 12.36 | 01.18 | 13.36 | 08.51 | 21.10 | 07.51 | 20.10 | 10.51 | 23.10 | 11.51 | - | 10.21 | 22.40 | 11.36 | 23.55 |
| 30. Juli | 11.11 | 23.27 | 10.11 | 22.27 | 10.26 | 22.42 | 00.55 | 13.11 | 01.55 | 14.11 | 09.26 | 21.42 | 08.26 | 20.42 | 11.26 | 23.42 | 00.10 | 12.26 | 10.56 | 23.12 | - | 12.11 |
| 31. Juli | 11.44 | - | 10.44 | 23.01 | 10.59 | 23.16 | 01.27 | 13.44 | 02.27 | 14.44 | 09.59 | 22.16 | 08.59 | 21.16 | 11.59 | - | 00.42 | 12.59 | 11.29 | 23.46 | 00.27 | 12.44 |

5 707265 100050 >